2. mars 2023

# Námsætlanaruppskot til hoyringar

Nám arbeiðir við at dagføra námsætlanir til føroyska skúlaverkið. Dagføringararbeiðið fevnir í sínari heild um námsætlanir í øllum lærugreinum í fólkaskúla og á gymnasialum miðnámi og í almennu lærugreinunum á yrkisnámi. Arbeitt verður í stigum, og námsætlanirnar, sum hervið verða sendar til hoyringar, eru:

- **Danskt 3-A**
- **Føroyskt sum annaðmál 1.-3. stig**

Námsætlanin í donskum er til næmingar frá 3. floksstigi í fólkaskúla til A-stig á miðnámi. Námsætlanin í føroyskum sum annaðmál er til næmingar í fólkaskúlanum, sum hana annað mál enn føroyskt sum fyrstamál.

Námsætlanaruppskotini eru send skúlum og øðrum viðkomandi hoyringarpørtum til hoyringar og liggja harumframt eisini á heimasíðuni www.namsaetlanir.fo til almenna hoyring.

Hoyringarsvar skulu sendast á nam@nam.fo í seinasta lagi **fríggjadagin 14. apríl 2023**.

**Kunning um dagføringararbeiðið**

Uttanríkis- og mentamálaráðið heitti í 2020 á Nám um at fara undir arbeiðið við at dagføra námsætlanirnar í øllum lærugreinum í fólkaskúla og á gymnasialum miðnámi og í almennu lærugreinunum á yrkisnámi.

Nám setti eitt toymi av ráðgevum at standa fyri arbeiðinum at dagføra námsætlanirnar. Í toyminum, sum hevur arbeitt við námsætlanum, sum hervið verða sendar til hoyringar, eru:

- Emmy Joensen, ráðgevi í almennari námsfrøði
- Asta Wolles, námsráðgevi í føroyskum og lesimenning í fólkaskúlanum
- Sólvá Jónsdóttir, námsráðgevi í føroyskum á miðnámi
- Dorthe Pedersen, námsfrøðiligt starvsfólk á Próvstovuni
- Jórun Vedelsbøl, námsráðgevi í donskum í fólkaskúlanum

Toymið hevur samstarvað við fylgibólkar, sum eru mannaðir av lærarum, umboðandi ymsu lærugreinarnar og ymsu stigini. Toymið arbeiðir nú saman við fylgibólkunum við at gera leiðbeiningar til námsætlanirnar.

**Yvirlit yvir størstu broytingarnar í dagførdu námsætlanunum**

- Námsætlanirnar eru skipaðar í fakligar námsætlanir fyri lærugreinarnar og eina støðisnámsætlan, sum fevnir um allar lærugreinar á øllum stigum. Innihaldið í støðisnámsætlanini fevnir lutvís um partarnar “Støðisførleikar” og “At skipa undirvísing” í núgaldandi námsætlanum, sum samstundis eru strikaðir í dagførdu námsætlanunum.
- Ískoytisøki eru strikað.
- Fakligu námsætlanirnar eru skipaðar sum samanhangandi námsætlanir frá byrjan í fólkaskúla til lokið yrkisnám ella gymnasialt miðnám.

- Ávegismál eru í dagførdu fakligu námsætlanunum orðað fyri 3. og 6. flokssstig í fólkaskúlanum. Í núgaldandi námsætlanum eru ávegismál orðað fyri. 2., 4. og 6. floksstig.
- Leiðbeiningar verða orðaðar við støði í bæði støðisnámsætlanini og í fakligu námsætlanunum.

Á heimasíðuni www.namsaetlanir.fo liggur ein kunnandi framløga um námsætlanarbygnaðin. Er tørvur á meira kunning, ber altíð til at venda sær til Nám við fyrispurningum.

**Tíðarætlan**

**Hoyring á heysti í 2021:**

- Støðisnámsætlan
- Føroyskt 1-A
- Náttúra og tøkni 4-6

**Hoyring á vári í 2023:**

- Danskt 3-A
- Føroyskt sum annaðmál 1.-3. stig

**Væntandi gildiskoma 1. august 2023:**

- Føroyskt 1-A
  - Galdandi frá 1. august 2023 fyri 1.-7. floksstig, E-stig, C-stig og fyri fyrsta árið á A-stigi. Síðan stigvís sett í gildi fyri hini stigini fyri at taka atlit at próvtøkunum.
- Danskt 3-A
  - Galdandi frá 1. august 2023 fyri 3.-7. floksstig og fyri fyrra árið á A-stigi. Síðan stigvís sett í gildi fyri hini stigini fyri at taka atlit at próvtøkunum.
- Náttúra og tøkni 4-6
  - Galdandi frá 1. august 2023 fyri 4. floksstig. Síðan stigvís sett í gildi fyri hini stigini fyri at taka atlit at landsroyndunum.
- Føroyskt sum annaðmál 1.-3. stig
  - Galdandi 1. august 2023 fyri 1.-3. stig í fólkaskúlanum.
- Støðisnámsætlan
  - Støðisnámsætlanin fylgir fakligu námsætlanunum, soleiðis at skilja, at hon kemur í gildi fyri lærugreinarnar føroyskt, danskt, náttúru og tøkni og føroyskt sum annaðmál við somu tíðarætlan sum fakligu námsætlanirnar. Støðisnámsætlanin kemur sostatt ikki í gildi fyri aðrar lærugreinar, fyrr enn dagførdar fakligar námsætlanir eru tøkar.

Vegna Nám

Tóri Slættalíð

Deildarleiðari fyri ráðgevandi deildina í Námi